

## 200 fáa arbeiðsboð mánadagin

Tey 529 ungfólkini, sum hava teknað seg til at vera við í verkætlanini "Ung í arbeiði" í summar, fáa mánamorgunin at vita frá Tórshavnar kommunu, um tey hava fingið tillutað pláss ella ikki. Hetta verður kunngjørt á heimasíðuni hjá kommununi, www.torshavn.fo. Tey, sum eru so heppin at fáa arbeiðsboð, fara eisini mánadagin at fáa sms-boð á fartelefonina um hetta. - Á heimasíðuni kunnu tey síggja, hvønn bólk, tey eru komin í. Í teimum førum, har bólkaleiðari er settur, kunnu tey eisini síggja tað, men enn eru ikki allir bólkaleiðararnir settir, sigur Tórshavnar Kommuna. Av teimum 529 verða tað umleið 200, sum fáa arbeiðsboð, og tey verða býtt í helvt, so umleið 100 arbeiða í tvær vikur og síðani umleið 100 í aftur tvær vikur. Frá 29. juni til 24. juli verða hesi ungu ein partur av býarmyndini, tá tey fara at fríðka um og gera ymiskt arbeiði runt um í kommununi.

# Bindiskeið við íblástri úr Japan

**Norðurlandahúsið bjóðar nú aftur til bindiskeið. Hesa ferð er tað danska Dorthe Merete Lykke Jensen, ið kemur at vegleiða við japanskum bindieffektum**

LIST OG HANDVERK
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í morgin verður skeið í binding í Norðurlandahúsinum. Fyri nøkrum vikum síðan var tað danska móta størnuskotið, Hans Christian Madsen, ið Norðurlandahúsið hevði fingið fatur í. Hesa ferð bjóðar Norðurlandahúsið føroyingum skeið saman við donsku Dorthe Merete Lykke Jensen. Hon er útbúgvin tekstilsniðgevi á sniðgevaraskúlanum í Kolding, og hevur umframt at arbeiða í danska mótaheiminum, eisini verið í Japan og arbeitt. Við royndum av altjóða mótaheiminum, fer



Dorthe Merete Lykke Jensen at greiða sínum arbeiðshátti, hvussu hon mennir sniðgevingarháttir og mynstur, samanseting av tilfari, binditeknikkir og alla arbeiðsgongdina frá fyrstu bindiroynd til lidnu kollektiónina.

Á skeiðnum í Norðurlandahúsinum verður bundið við hond. Sniðgevin heitir á tey, ið ætla at luttaka, um at hava við sær stokkar og tógv av ymsum tjygdum. Tey, ið luttaka á skeiðnum, skulu sniðgeva spennandi strukturflatur við íblástri frá teimum teknikkum, sum Dorthe gevur gjøgnum skeiðið. Tað kann eitt nú vera binding við skiftandi stokkatjygdum, ella bindiroyndir, sum luttakarar seinni kunnu nýta til klædnasniðgeving ella til býli.

Tilmelding fer fram við at venda sær til Norðurlandahúsið.

# Statistar til jarðarferð

**Filmsfólkini handan Buzz Aldrin leggja í løtuni seinastu hond á upptøkurnar í Føroyum. Teimum tørvar nú statistar. Millum annað til eina jarðarferð í Saksun**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Sum nevnt fleiri ferðir fyrr í vár, fara upptøkurnar til "Buzz Aldrin, hvor ble det av det i alt mylderet?" fram í Føroyum í summarmánaðunum. Leiklutirnir eru allir settir, bilar eru funnir, og so smátt er klárt at fara undir upptøkurnar.

Men nú manglar filmsliðnum statistar til ymsu upptøkurnar. Nevnast kann, at statistar millum annað skulu nýtast til eina jarðarferð í Saksun og til eina upptøku inni á Café Natúr. Eyð Matras, ið samskipar hendan partin av upptøkunum, sigur at tey skulu nýta umleið 80 fólk, og at tey skulu vera at finna í aldursbólkinum 25-70 ár. Brúk er fyri báðum kynum, og væntandi skulu statistarnir nýtast í fleiri upptøkum.

Í Saksum verður tikið upp frá 16. juli og fram eftir, og á Café Natúr eftir ólavsøku. Byrjað verður at taka upp 23. juni, og tíðliga í juni mánaði skulu allar upptøkurnar vera lidnar.

Tey, ið hava hug at vera



statistar í filminum, sum er bygdur á skaldsøguna eftir Johan Harstad, kunnu seta seg í samband við Eyð Matras á eymatr@post.olivant.fo við upplýsingum um aldur, kyn, telefon nummar og nær tey eru tøk.

Samsýning verður latin statistunum.



# Eykakonsert við Guðrið

**Útgávukonsertin hjá Guðrið Hansdóttir í Sjónleikarhúsinum er útseld. Tí verður eykakonsert tveir tímar seinni, klokkan 22 í annaðkvøld**

TÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Áhugin fyri at hoyra nýggja tilfarið hjá Guðrið Hansdóttir, er stórur. Tað er longu útselt til útgávukonsertina, sum verður leygarkvøldið 13. juni kl 20. Tí verður eykakonsert seinni sama kvøld, klokkan 22 í Sjónleikarhúsinum.

Leygarkvøldið klokkan 20 fer Guðrið Hansdóttir at hava útgávukonsert í sjónleikarhúsinum. Nýggja fløgan The Sky is Opening kom út síðsta fríggjadag, og hava løgini sum I Defy og Walk With Me verið nógv at hoyrt í Kringvarpinum síðan fløgan kom út. Leygarkvøldið fer Guðrið at framføra nýggju løgini, og við sær hevur hon nakrar av landsins bestu tónleikarum. Nevnast kunnu Mikael Blak, Magnus Johannesen, Leivur Thomsen, Líggjas Olsen, Flóvin E. Viderø, Tóri Restorf, Rebekka Blak, Bernharður Wilkinson, Ása Wraae og Ólavur Olsen.

Heiðrik á Heygum fer at hita upp og fer hann at framføra nýggj løg av síni komandi útgávu. Atgongumerki fáast á MESS skrivstovuni í Niels Finsensgøtu og í Expert í SMS.